ítróttur

Nr. 205 • hósdagur • 27. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kanón byrjan upp á svimjiárið

**Seks ferðir vórðu føroysk met sett, tá svimjikapping var í Gundadali um vikuskiftið. Og fimm nýggj bólkamet komu eisini**

SVIMJING
*Jákup Mørk*



*Elspa Mørkøre staðfesti enn einaferð, at hon er í einum flokki fyri seg*

Elspa Mørkøre úr Fuglafjarðar Svimjifelag er fyrsta føroyska kvinnan, sum hevur svomið 100 metra frí undir minuttin.

Tað er ein veruleiki, sum uttan iva var størsta einstaka hendingin, tá Havnar Svimjifelag um vikuskiftið var vertur fyri svimjikapping.

At fara undir minuttin hevur aloftast staðið sum eitt slag av gandakendum máli hjá svimjarum, og við at vera fyrsta kvinnan undir hesum máli, hevur Elspa enn einaferð undirstrikað, at hon er eitt talent væl omanfyri tað vanliga. Verður so lagt afturat, at hetta var bara eitt av fýra metum leygardagin. At hon í eitt ár hevur drigist við argandi skaða. Og at metið varð sett dagin eftir 14 ára føðingardagin. So stendur tað helst enn meira fast, hvussu óvanlig avrik hennara eru.

Í alt vórðu føroysk met sett seks ferðirnar. Jutta Thomsen legði fyri, tá hon fríggjadagin setti nýtt met á 200 metra frí, men longu leygardagin skar Elspa nærum tvey sekund av hesum.

Jutta varð tó ikki heilt við sviðið soð, tí saman við felagnum var hon við til at seta nýtt met á 4X200 metrum hjá kvinnum.

Hjá yngru svimjarunum vórðu eisini fleiri met sett. Serliga gjørdi Kári J. á Høvdanum um seg. Einsamallur setti hann trý nýggj met, og við stafettini hjá FS var hann við til at seta met á 4X200 metra frí. Hartil fekk Jutta eisini eitt met her, tá hon svam seg til nýtt bólkamet á 800 metra frí.

### Silvurnál og NM

Umframt at vera svimjikapping, so var kappingin í Havn eisini úttøkukapping til Norðurlendsku juniormeistarakappingina, sum verður í Danmark í desember mánaði.

Hesa ferð svumu Jutta Thomsen og Elspa Mørkøre seg til pláss í kappingini, og á komandi Ægir stevnuni fáa enn fleiri svimjarar møguleika at svimja seg til kravtíðirnar.

Hartil varð svimjilandsliðið eisini víðkað við einum svimjara. Rakul Hauritz úr Vágs Svimjifelag svam seg til silvurnálina á 50 metrum frí, og hendan er samstundis atgongumerki til landsliðið.

Samlaða heiðursmerkjabýtið í kappingini varð hetta:

| | Gull | Silvur | Bronsu |
|---|---|---|---|
| **Havnar svimjifelag** | 50 | 40 | 29 |
| **Fuglafjarðar svimjifelag** | 34 | 22 | 8 |
| **Tvøroyrar svimjifelag** | 23 | 18 | 4 |
| **Vágs svimjifelag** | 14 | 15 | 14 |
| **Ægir** | 12 | 8 | 5 |
| **Reki** | 6 | 4 | 10 |
| **Flot** | 3 | 4 | 5 |

## Metini í Havn

**Jutta Thomsen, Tvøroyrar Svimjifelag**
Bólkur 5 800 m frí 9.34,13
FM 200 m frí 2.13,50

**Elspa Mørkøre, Fuglafjarðar Svimjifelag**
FM 200 m frí 2.11,53
FM 50 m rygg 0.31,24
FM 50 m frí 0.27,94
FM 100 m frí 0.59,96

**Tvøroyrar Svimjifelag**
FM 4X200 m frí 9.13,10
Á liðnum vóru Jutta Thomsen, Anna K. Eysturberg, Sára Ejdesgaard og Mona Simonsen

**Fuglafjarðar Svimjifelag**
Bólkur 5 4X200 m frí
Á liðnum vóru Kári J. á Høvdanum, Jákup Øssurson, Pauli Ø. Mohr og David Simonsen

**Kári J. á Høvdanum, Fuglafjarðar Svimjifelag**
Bólkur 5 100 m rygg 1.02,38
Bólkur 5 50 m rygg 0.29,17
Bólkur 5 200 m rygg 2.13,26

# Standa í stað

**Føroyar eru framvegis at finna sum nummar 134 á styrkislistanum hjá FIFA. Hesa ferð er India farið framum, meðan Liberia er dottið afturum**

LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk*

Tað er kanska ikki heilt so galið, tá landsliðið, sum George Weah í síni tíð spældi við, nú verður styrkismett ájavnt okkum. Men í mun til støðuna, sum Føroyar áður hava havt á listanum, so er talan um afturstig.

Afturstigini munnu tó fyri ein stóran part stava frá, at Føroyar í tveimum undankappingarbólkum á rað eru komnar í »lítlu« bólkarnar. Tað vil siga, at vit ikki hava møtt nøkrum av smærru tjóðunum í undankappingardysti, síðani vit fyri fýra árum síðani spældu móti Luksemburg. Í venjingardystum eru nøkur stig sjálvandi fingin til høldar, men hesi telja ikki eins nógv og undankappingardystirnir.

Hóast oktober mánaði millum annað innibar seinastu undankappingardystirnar í júst lidna bólkaspælinum, so broytti hetta tó ikki stórvegis um samansetingina á listanum.

Av ovaru londunum var tað Svøríki, sum hevði størsta fallið. Teir vóru annars á einum 10. plássi seinast, men hesa ferð eru teir at finna sum nummar 13. Ongland er hinvegin komið aftur á topp-10.

Ovast á listanum er framvegis Brasil, meðan Frakland hevur togað seg nakað upp, soleiðis at teir nú eru á fimta plássinum.

Ovasti parturin av listanum saman við norðurlendska partinum, sær nú soleiðis út. Tølini í klombrum siga, hvørja støðu londini høvdu á listanum fyri september mánað.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | (1) | Brasil |
| 2 | (2) | Holland |
| 3 | (4) | Kekkia |
| 4 | (3) | Argentina |
| 5 | (6) | Frakland |
| 6 | (5) | Mexico |
| 7 | (7) | USA |
| 8 | (8) | Spania |
| 9 | (11) | Ongland |
| 9 | (9) | Portugal |
| 13 | (10) | Svøríki |
| 14 | (14) | Danmark |
| 37 | (37) | Noreg |
| 44 | (40) | Finnland |
| 92 | (92) | Ísland |
| 134 | (134) | Føroyar |